Kommunufelagið

Umhvørvismálaráðið

19. februar 2024

Viðvíkjandi broytingum í elveitingarlógini

Undanfarna samgonga hevði stórar og kollveltandi ætlanir á elorkuøkinum. Ætlanir, ið kommunurnar sum eigarar av SEV, als ikki kundu góðtaka. Fyri at tryggja eina framhaldandi samhaldsfasta elskipan í Føroyum fóru kommunurnar, saman við SEV, tí undir samráðingar við undanfarna landsstýri. Úrslitið var semjan millum landsstýrið, kommunurnar og SEV frá 22. mars 2022.

Síðan semjan varð undirskrivað, hava orkumyndugleikin og SEV – sambært punkti 5 í semjuni – gjørt eina tíðarfesta ætlan fyri, hvussu elframleiðslan skal økjast komandi árini.

Eisini hevur ein arbeiðsbólkur, mannaður av umboðum fyri Kommunufelagið, Umhvørvismálaráðið og Umhvørvisstovuna, í desember 2023 handað landsstýriskvinnuni eitt tilmæli um sølumarknað sambært punkti 7 í semjuni frá 22. mars 2022. Í tilmælinum er gjørt greitt, at hóast ein marknaður fyri sølu av el nú verður skipaður í Føroyum, fer altíð at bera til at keypa beinleiðis frá SEV, og at øll, sum keypa frá SEV, rinda sama kostnað, óansæð hvar tey búgva í landinum.

Harumframt situr ein arbeiðsbólkur – sambært punkti 10 í semjuni – og arbeiðir við einari skipan fyri, hvussu framleiðslueindir, ið serliga eru ætlaðar til egna nýtslu hjá orkukrevjandi kundum, kunnu verða knýttar í elkervið. Hetta arbeiðið verður væntandi liðugt í vár.

Núverandi samgonga hevur sett sær fyri at dagføra elveitingarlógina við støði í semjuni frá 22. mars 2022. Men samgongan hevur tó eisini í samgonguskjalinum sett sær fyri, at: “SEV skal kunna bjóða upp á vindorkuútbyggingar á jøvnum føti við privat feløg”.

Líka síðan henda tilgongdin byrjaði fyri trimum árum síðan, hevur Kommunufelagið lagt seg eftir at fáa elveitingarlógina í samsvar við hesi yvirskipaðu prinsipp:

- At tað verður staðfest, at vit hava bara eittans elnet í Føroyum, og tað er elnetið hjá SEV, og at leikluturin hjá SEV viðvíkjandi elskipanini verður greitt defineraður.
- At tað verður greitt definerað, júst hvat elnetið umfatar.
- At allir kundar frameftir altíð kunnu velja at keypa beinleiðis frá SEV.
- At tað verður ásett, at øll nýggj elframleiðsla verður boðin út, og at útboð verða framd eftir einari langtíðarætlan.
- At SEV umvegis dótturfelag kann luttaka í kappingarútsettum framleiðsluvirksemi á jøvnum føti við aðrar framleiðarar.

Kommunufelagið

Hesi prinsipp eru, saman við semjuni og teimum tilmælum, ið eru nevnd omanfyri, høvuðsfyritreytirnar fyri viðmerkingunum hjá Kommunufelagnum. Viðmerkingarnar hjá Kommunufelagnum til einstøku broytingarnar eru í hjálagda fylgiskrivi.

Vegna Kommunufelagið

Torbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri

Kommunufelagið
Fylgiskriv

Viðmerkingar til ætlaðu broytingarnar í elveitingarlógini

Til § 1, stk. 4
Í uppskotinum verður leikluturin hjá SEV nú greiðari defineraður. Men tað eigur tó eisini at verða gjørt greiðari, júst hvat føroyska elnetið umfatar. Mælt verður tí til at orða § 1, stk. 4 soleiðis:
"*Stk. 4.* Tá ið SEV er nevnt í hesi lóg, verður sipað til uppgávuna hjá SEV sum eigari og kervisábyrgdari av føroyska elnetinum. Føroyska elnetið fevnir um netið frá framleiðslu til og við málaran hjá endabrúkaranum, t.e. flutningsnetið og býtisnetið. Harumframt eru allar tær skipanarberandi eindirnar við tilhoyrandi framleiðslu, sum t.d. termisk verk, vatnorkuverk og møgulig pumpuverk, eisini partur av føroyska elnetinum."

Til § 1, stk. 5
Hóast ásetingin er í samsvari við semjuna frá 2022, er hon ikki í samsvari við politikkin hjá núverandi samgongu, har tað í samgonguskjalinum verður sagt, at "SEV skal kunna bjóða upp á vindorkuútbyggingar á jøvnum føti við privat feløg". Tí tað má ásannast, at um onki persónssamanfall má vera yvirhøvur, so bjóðar SEV ikki á jøvnum føti við privat feløg, ið onga slíka avmarking hava millum móður- og dótturfelag.

Tað er jú ikki møguligt hjá einum og sama eigara at hava ábyrgd av og stýra tveimum feløgum á skynsaman hátt uttan eitt ávíst persónssamanfall antin í dagligu leiðsluni ella í nevndini. Eisini er talið av serfrøðingum innan eløkið avmarkað í Føroyum, so okkurt persónssamanfall má kunna koma fyri í starvsfólkahópinum. Fyri at umganga persónssamanfalli í teimum avgerðum, sum viðvíkja dagliga rakstrinum, verður mett nóg mikið at banna persónssamanfalli í dagligu leiðsluni.

Mælt verður tí til, at § 1, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 5.* Tá interkommunala elfelagið luttekur í kappingarútsettum virksemi, skal hetta gerast í sjálvstøðugum felagi uttan persónssamanfall við SEV í dagligu leiðsluni í sjálvstøðuga felagnum."

Til § 4, stk. 1
Í dag eru tað bara tey framleiðsluverk, sum skulu íbindast elnetið, ið skulu hava loyvi. Frameftir skulu øll framleiðsluverk hava góðkenning, og øll størri verk hava loyvi frá landsstýrismanninum. Hesum tekur Kommunufelagið fult undir við.

Til § 4, stk. 2
Uppskotið ger onki við núverandi ógreiðu ásetingarnar viðvíkjandi longd av loyvum. Mælt verður til, at tað verður gjørt greiðari í lógini, at verandi loyvi ikki bara kunnu leingjast óendaligt 20. hvørt ár, men at tey hava eina endaliga gildistíð. Eisini eigur at verða gjørdur skilnaður millum loyvini hjá SEV sum kervisábyrgdari og onnur loyvi.

Til § 4, stk. 5
Í galdandi lóg verður "savningarøki" nevnt sum nakað, sum loyvishavarar skulu samstarva um. Savningarøki hevur við vatnorku at gera, ið sambært semjuni hoyrir undir SEV. Mælt verður tí til at strika orðið "savningarøki" úr tekstinum.

Kommunufelagið

Til § 5, stk. 3
Ein slík sonevnd *Open-Door*-skipan, sum her verður givin heimild fyri, er ikki í tráð við semjuskjalið frá frá 22. mars 2022, pkt. 5, sum sigur, at ein útbyggingarætlan skal gerast av SEV og landsmyndugleikunum. Ein open-door-skipan gevur einum komandi landsstýri møguleika fyri at síggja burtur frá útboðs- og útbyggingarætlanini.

Mælt verður tí til, at Open-Door møguleikin verður strikaður.

Sambært viðmerkingunum til § 5, stk. 3, er ætlanin, at allir orkuformar skulu í útboð. Her ger Kommunufelagið vart við, at vatnorka eigur ikki at verða boðin út, tí hon er við til at veita skipanarberandi tænastur.

Til § 5, stk. 4
Sambært uppskotinum kann landsstýrisfólkið loyva, at avlopsel frá framleiðslu til egna nýtslu kann leiðast inn á netið. Men hendan lógarbroyting eigur ikki at verða gjørd, fyrr enn arbeiðsbólkurin, sum hevur arbeitt við punkti 7 í semjuskjalinum frá 22. mars 2022, hevur viðgjørt punkt 10 í sama semjuskjali.

Mælt verður tí til, at broytingin verður strikað.

Til § 9, stk. 1
Galdandi § 9 gevur heimild fyri fleiri netloyvum. Hetta eigur at verða broytt soleiðis, at staðfest verður, at vit bara skulu hava eittans elnet í Føroyum. Hetta er eisini í samsvari við semjuna, har punkt 1 staðfestir, at "SEV eigur, rekur og hevur kervisábyrgdina fyri elskipanini".

At veita loyvi til eitt alternativt elnet í Føroyum er at fara burtur frá samhaldsføstu skipanini, og má tí sigast at vera ein so stór og prinsipiel avgerð, at hon ikki eigur at kunna verða tikin av einum einsamøllum landsstýrisfólki. Slík avgerð eigur at innibera eina lógarbroyting, soleiðis at løgtingið kann taka støðu til broytingina.

Mælt verður tí til at orða § 9, stk. 2 soleiðis:
"Stk. 2. Einans SEV hevur loyvi til netvirksemi eftir stk. 1."

Til § 9, stk. 6
Betur var at broytt hetta soleiðis, at SEV kann gera avsláttarskipan til hitapumpur og elbilar, heldur enn sum nú, at SEV kann áseta serligan prís fyri elnýtslu til góðkendar hitapumpur sambært BK17 og til elbilar.

Endamálið við broytingini er at tillaga verandi skipan á slíkan hátt, at sleppast kann undan at skula uppseta eyka elmálarar.

Verður lagt upp fyri omanfyri nevnda í § 15 h, kann § 9, stk. 6 verða strikað.

Til § 10
Galdandi § 10 sigur, at netvirksemið hjá SEV skal fíggjarliga hvíla í sær sjálvum. Hetta eigur at verða broytt til, at samlaða virksemið hjá SEV (tó ikki dótturfeløg) skal fíggjarliga hvíla í sær sjálvum. Við nýggju definitiónini av SEV er ikki longur neyðugt at hava sjálvstøðugan roknskap fyri netvirksemi.

Kommunufelagið

Mælt verður tí til at orða § 10 soleiðis:
"§ 10. SEV skal fíggjarliga hvíla í sær sjálvum, soleiðis at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann, eftir samráðingar við SEV, krevja, at virknisfremjandi tiltøk verða sett í verk fyri støðugt at betra um raksturin.

Til § 11, stk. 3
Sambært galdandi lóg skulu SEV og landsstýrisfólkið meta um framtíðar tørv á útbyggingum. Hetta er ein rættiliga óítøkilig og lítið bindandi orðing.

Mælt verður tí til at orða § 11, stk. 3 soleiðis:
"Stk. 3. SEV skal í samráð við landsstýrisfólkið leggja til rættis og meta um framtíðar tørv á at byggja út ravmagnsframleiðsluverk og -net. Út frá hesi meting gera orkumyndugleikarnir og SEV eina tíðarfesta útboðsætlan, sum verður regluliga dagførd í minsta lagi 5. hvørt ár."

Til § 12, stk. 2 og stk. 4
Við lógarbroytingini verður SEV definerað av nýggjum. Stykkini 2 og 4 í § 12 eru tí ikki hóskandi longur og mugu orðast av nýggjum.

Til kapittul 3 a
Fjarhitavirksemi kemur nú undir lógina. Fjarhitavirksemi fevnir um hitaframleiðslu og hitanetið. Hitanetið eigur at hvíla í sær sjálvum, meðan hitaframleiðslan kann verða kappingarútsett. Tó verður tað altíð eigarin ella operatørurin av fjarhitanetinum, sum velur, um hann ger avtalu við ein hitaframleiðara ella ein annan. Kapittul 3 a um fjarhitavirksemi er ov ógreiður hesum viðvíkjandi.

Sum heild tekur Kommunufelagið ikki undir við, at fjarhitavirksemi verður regulerað í elveitingarlógini. Greiðari var at gjørt tað í serstakari lóg. Mælt verður tí til, at landsstýriskvinnan setur ein arbeiðsbólk við serkønum og umboðum fyri kommunurnar og Fjarhitafelagið at gera uppskot til slíka serstaka lóg.

Annars hava kommunur gjørt vart við hesi ivamál viðvíkjandi fjarhita:

- Skal framtíðar *útbygging* eisini roknast út í mun til CO_2-útlát? T.v.s. hvat CO_2-útlát stendst av at útbyggja?
- Í § 15 c stk. 3: ... *upplýsing um útlát av vakstrarhúsgassi o.tíl.* Hvønn part av virkseminum fevnir hetta um? Eisini elveting til vekslaraskipanir?
- Í hvønn mun skal kommunan spyrja/søkja um loyvi til at útbyggja verandi skipan? (hvør fer at umsita loyvini?)
- §15 a stk. 5: ... *hvørji tilbúgvingarlig átøk kunnu setast í verk*. Hvørja tilbúgving meinar mann við?
- Hvørja ítøkiliga ávirkan hevur lógaruppskotið á núverandi fjarhitaveitingar? (t.d. tær í Tórshavn, Leirvík og Klaksvík)
- Í hvønn mun fer broytingin at hava ávirkan á skuldarmarkið hjá kommununi, um fjarhitafelag, sum kommuna er partur av, tekur lán?

Kommunufelagið

Til kapittul 3 b
Fyri at gera ásetingarnar meira neyvt í samsvar við tilmælið frá arbeiðsbólkinum viðvíkjandi punkti 7 í semjuskalinum verður mælt til, at §15 g verður orðað soleiðis:

*"***§ 15 g.** SEV keypir alla møguliga framleidda elorku og selir søluliðinum hana við skiftandi tímaprísi. Skiftandi tímaprísurin skal umboða skiftandi útreiðslurnar í elframleiðsluni umframt yvirskot til neyðugar íløgur. Sølan fer fram í heilsølu ella í smásølu.
Stk. 2. SEV luttekur í søluliðinum, soleiðis at endabrúkarin altíð kann keypa elorku beinleiðis frá SEV. SEV skal gera sjálvstøðugan roknskap, sum vísir beinleiðis útreiðslurnar av at luttaka í søluliðinum. Hetta virksemið skal ikki skipast í sjálvstøðugt felag, so leingi søluliðið hjá SEV leiðir streymin beinleiðis víðari til endabrúkaran. Prísurin hjá endabrúkaranum skal vera kunngjørdur heilsøluprísur frá SEV umframt veruliga kostnaðin av at umsita endabrúkaran.
Stk. 3. SEV skal dagliga áseta bindandi tímaprís fyri næsta døgnið grundað á samansetingina av orkukeldum. SEV skal á heimasíðu síni, ella á annan hátt, kunngera prís og tíðarskeið fyri sølu. Eisini skal ein mett miðal prísforsøgn gerast fyri næstu dagarnar.
Stk. 4. SEV kann gera avtalur um serprís til størri kundar, sum eitt nú eru íbundnir háspenning, sum kunnu veita SEV skipanarberandi tænastur ella sum í serliga stóran mun kunnu gagnnýta avlopsorku. Prísurin skal umboða kostnaðin hjá SEV av at hava stóru kundarnar og skal góðkennast av Elveitingareftirlitinum.
Stk. 4. SEV kann áseta ymisk netgjald í mun til skiftandi last á elnetinum.
Stk. 5. Landsstýrisfólkið ásetur í kunngerð nærri reglur um útboð og meginreglur fyri ásetan av prísi.

Av somu orsøk verður mælt til, at § 15 h, stk. 1, verður orðað soleiðis:
"§ 15 h. Sølufeløg skulu hava góðkenning frá landsstýrisfólkinum fyri at selja el. Góðkenningartreytirnar skulu mennast saman við SEV."

Til § 15 i og § 15 j
Sambært uppskotinum skal landsstýrisfólkið hvørt ár góðkenna fíggjarætlanina hjá SEV. Kommunufelagið metir ikki, at tað er hóskandi, at eitt landsstýrisfólk hevur heimild til at mikrostýra einum interkommunalum stovni. At góðkenna fíggjarætlanina má sigast at vera leikluturin hjá nevnd og eigarum.

Semja er longu um bench-marking av rakstrinum hjá SEV, og útboðs- og útbyggingarætlan – sum er gjørd saman við landsstýrinum – stýra íløgunum hjá SEV. Eisini skal lønarlagið í SEV góðkennast av Fíggjarmálaráðnum. Harumframt er kunngerðarheimild í § 15 g, stk. 5, har landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um útboð og meginreglur fyri ásetan av prísi.

So samanumtikið hevur landsstýrið munandi fíggjarliga ávirkan á SEV longu sum er. Mælt verður tí til, at §§ 15 i og 15 j verða strikaðar.

Viðvíkjandi gildiskomu
Sambært uppskotinum koma ásetingarnar viðvíkjandi keypi og sølu í gildi 1. september 2024. Havandi í huga, at tað er óvist, hvussu langa tíð tað tekur at menna tøkniliga grundarlagið undir skipanini við tímaprísi, so er helst best at áseta, at landsstýrisfólkið fær heimild til at seta kapittul 3 b í gildi við kunngerð, tá ið skipanin hjá SEV er klár.